# KUNNING

## Starvsfólk

Aftaná summarferiuna arbeiða hesi á stovunum.

Nesastova: Hertha, Jana, Annetta og Mai.

Sarpastova: Jona, Sólgerð, Bjørg og Mai.

Giljastova: Jannet, Kristina og Elin.

Bakkastova: Sigga, Magny, Ann-Mari og Linda.

Sandastova: Leila, Una og Asbjørg.

Sóljustova: Christina, Ketty og Súsanna.

## Nýggjur námsfrøðingur

Leila Haraldsen byrjar hjá okkum síðst í august.

## Relatiónir

Yvirskriftin hjá Sóljugarði í ár er Relatiónir.

Á henda hátt seta vit fokus á týdningin av tí góðu relatiónini. Bæði millum starvsfólk og børn og barnana millum.



## Mars til juli

*Djóratema*

Aftaná at foreldraviðtalurnar vóru avgreiddar og føstulávint var farið aftur um bak, var djóratema á skránni. Hetta er sprotið burtur úr sporum, sum vit síggja hjá nógvum børnum í Sóljugarði. Vit síggja børn í garðinum, sum samla sær smákykt og hava nógva fragd av tí. Eisini hava vit fingið vitjan av fleiri húsdjórum, sum foreldrini eru komin við. Bæði kettir, hundar og kaninur. Børnini hava gingið túrar í bygdini og sæð nógv ymisk djór. Her eru bæði seyður, hønur, dunnur, vaktlar, lama, ponny hestar, fírbein, slangur og nógv annað. Vit fingu skaffað okkum eina klekimaskinu - har komu 7 høsnarungar úr. Stuttligt og læruríkt, fyri børn og vaksin, at fylgja við hesi tilgongdini. Fyrsti høsnarungin kom út sjálvan Ommu- og abbadagin.





## Ráðleggingardagurin

Í ár høvdu Christina og Mai ein fyrilestur um týdningin av rørslu og sansastimbran. Og hvussu hetta kann samantvinnast við spæl og virksemi á stovninum.

## Myndir á soljugardur.fo

Heimasíðan hjá okkum er dagførd við myndum.

- Føstulávint
- Verkstaður
- Djóratema
- Umhvørvisvikan
- Ommu- og abbadagurin
- Føðingardagurin

## Summarferia

Vit fara at ynskja øllum eina góða summarferiu. Stovnurin letur hurðarnar upp aftur mánadagin 14. august. Vit gleða okkum at síggja tykkum øll aftur. Og tykkum, sum byrja í skúla ynskja vit blíðan byr.

## September

Foreldrafundir og myndatøka .

### *Umhvørvisvikan*

Í mai mánaða var umhvørvisvika í Vága kommunu. Í Sóljugarði fingu vit vitjan av Ingmar á Løgmansbø, sum greiddi okkum frá, hvussu vit ansa eftir umhvørvinum. Vit ruddaðu garðin, runt um í bygdini, og saman við skúlabørnum, ruddaðu vit sandin. Vit plantaðu kjarnir av ymiskum fruktum og bjóðaðu til foreldrakaffi, har foreldrini høvdu egnan kopp við. Nógv rusk varð samlað saman. Ein góður máti at gera vart við týdningin av at fara væl við umhvørvinum.



### *Ommu- og abbadagur*

Fyrst í juni bjóðaðu vit ommum og abbum til ein drekkamunn. Hetta var ein væleydnaður dagur. Hugnaligt var, sum altíð, tá ommur og abbar geva sær stundir til at vitja stovnin. Børnini, og starvsfólkini við, elska henda dagin.

### *Føðingardagurin*

Í ár fyltu vit 14 ár. Veðrið var tilvildar, og vit hugnaðu okkum. Børnini sungu “Másin sigur pli, pli, pli”, tey fingu ein túr á rossabaki fram við ánni. Vit grillaðu pylsur og ótu føðingardagskaku.



